# Kularrøtur og Trøllapætur til Íslands



Nú sleppa íslendsk børn eisini at lurta eftir kulu rótunum

Tað munnu vera fá børn - og vaksin fyri tað - sum ikki kenna kulu røturnar, sum nú í fleiri ár hava verið at hoyrt og sæð á bæði fløgu- og videoútgávum. Og ikki minni kendur man vinur teirra - Trøllapætur - vera her heima.

Og framvegis verða tað fyrst og fremst føroykt børn og barnsligar sálir, sum koma at fáa gleði av teimum. Eitt nú við nýggjari uppsamlingsútgávu, sum skjótt verður at fáa í handlum kring landið.

Men samstundis er eisini ætlanin, at tey í londunum kring okkum eisini skulu fáa møguleikan at uppliva hetta. Nú til jóla kemur nevnliga ein nýggj útgáva á íslendska marknaðin. Kætir krakkar og Trøllapétur eitur útgávan, sum fyrst og fremst inniheldur íslendskar útgávur av løgum hjá Kularrótum, men har Trøllapætur tó eisini er at hoyra.

**Jólagáva: Tíni bíløt í álminakkanum**

Málini á álminakkanum eru 30x42 cm. Útsligin er hann tvey tjúkk A4 ørk við einum spirali í miðjuni.




Síðsta bíleggingarfreist fyri levering áðrenn jól er 8. desembur

Áhugaður?
Fær inn á **www.jetprint.dk/fo**

Bílegg álminakkan hjá:
JetPrint ApS
T-post: álminakki@jetprint.dk
Tlf: **+45 86 98 76 66** * + porto og eksp. Kr. 92,- óansæð mongd.

JetPrint ger eisini prent- og kopiuppgávur

# Túsund sms og eitt átak

**Seinasta marknaðarátakið hjá Kalli er grundað á sonevnda virala marknaðarførslu. Slík munn til muns marknaðarførsla kann vera eitt gott amboð, tá ið smærri fyritøkur kappast við tær størru**

MARKNAÐARFØRSLA
*Tíðindaskriv frá Kalli*

Seinastu vikurnar hevur Kall skipað fyri lýsingaátakinum »1000 sms« sum hevur til endamáls at marknaðarføra eitt telekort, ið gevur kallkundum 1.000 sms-boð niðurfyri. Átakið er grundað á veruliga og nýstovnaða tónleikabólkin, The Message, sum fýra kendir unglingar manna. Hesir hava gjørt og tikið upp løg, ið onkursvegna eru sprottin úr hugskotinum um tey 1.000 sms-boðini frá Kalli. Átakið kemur á hámarkið í dag, hósdagin 24. novembur, tá ið The Message fer á pall í SMS at framføra heitislagið á útgávuni (telekortinum) »1000 sms«. Átakið endar við, at The Message fer konsertferð kring landið.

### Eins og virus

Slík øðrvísið marknaðarførsla er ikki áður roynd so miðvíst í Føroyum.

Lýsingahátturin er grundaður á enska hugtakið »viral marketing« sum sn‡r seg um at fáa eini boð at spjaða seg sum ein og hvør lívvera ella virus. Við lýsingum og tíðindaskrivum leggur tú út kunning um ávíst evni, og so taka fólk, ið aloftast samskifta sínámillum við teldu ella telefon, tíðindini til sín og senda vinum og kenningum tey.

Hetta verður mangan rópt munnur til muns hátturin, hóast tað heldur átti at itið teldu til teldu ella telefon til telefon hátturin. Hvørki landafrøði ella gomul miðlamørk eru forðingar longur, og fólki nýtist ikki at hava ávísar førleikar til tess at vera við. Hetta er fullkomiliga markleyst samskifti: Øll kunnu skriva alt altíð, og nevndu tíðindi um nýggja bólkin og nýggju útgávuna ferðaðust tí so skjótt sum snarljósið.


Tað er tónleikabólkurin, the Message, sum er snúningspunktið í nýggja átakinum hjá Kalli

*Mynd: Jens Kristian Vagn*

**BÍLIGAN BIL ??**

**LADA NIVA 4x4**



**Prísir úr: 96.900,-**
**Sum persónbilur, úr: 104.900,-**

**LADA 112**



**Prísir úr: 74.900,-**

LADA
**AKFARSØLAN**
HEYGSVEGUR 30
TEL 27 69 75 - FAX 31 8119

VERKSTAÐIÐ VÓN

**Jólasølan hjá Verkstaðnum Vón**

Árliga jólasølan verður á verkstaðnum *mikudagin 30. november frá kl. 14.00 til 19.00 og hósdagin 1. desember frá kl. 14.00 til 19.00*

Møguleiki verður at keypa sær drekkamunn við onkrum heimabakaðum afturvið.

**Øll eru vælkomin**

**Verkstaðið Vón**
Hóvabrekka 1 - Argir

# Havnar Bio hevði sítt besta vikuskiftið nakrantíð

**Seinasta vikuskiftið var tað besta í søguni hjá Havnar Bio. Ongantíð áður hava so nógv fólk verið í biograf eitt vikuskiftið, og orsøkin til tað var nýggi filmurin um Harry Potter**

BIOGRAF
*Eyðun Klakstein*

Áhugin fyri stórfilmum merkist eisini í Føroyum. Nú tann fjórði filmurin um Harry Potter varð frumsýndur í Havnar Bio síðsta vikuskiftið, var áhugin fyri at hyggja eftir filminum sera stórur.

– Vit seldu eini 1000 atgongumerki, áðrenn filmurin yvirhøvur var vístur, sigur Jákup Eli Jacobsen, sum rekur Havnar Bio.

Og vikuskiftið royndist eisini væl, tí ongantíð áður hava so nógv fólk verið í Havnar Bio eitt vikuskiftið.

– Hesin filmurin hevur fingið sera góða byrjan, og soleiðis var eisini í Danmark, men enn vita vit ikki, um áhugin fyri hesum filminum varðar líka leingi, sum vit hinum filmunum um Harry Potter, sigur Jákup Eli.

Ætlanin er, at Harry Potter-filmurin verður sýndur í Havnar Bio fram til 14. desember, tá ein annar stórfilmur verður frumsýndur. Tað er filmurin King Kong.